

Mynd: Álvur Haraldsen

# Kæran hjá Tjaldri avvíst

**HONDBÓLTUR Á fundi í gjár gjørdi kappingarnevndin hjá Hondbóltssambandinum av at vísa kæruni frá Tjaldri um VB-dystin frá sær. – Vit fara víðari við málinum, sigur Niels Peter Bech, næstformaður í Tjaldri**

Hilmar Jan Hansen

Kappingarnevndin hevði fund seinnapartin í gjár, har kæran hjá Tjaldri um dystin ímóti VB leygardagin varð viðgjørd. Niðurstøðan var, at kappingarnevndin vísir kæruni frá sær.

Millum annað vísir kappingarnevndin á, at videoupptøkur ikki kunnu takast við í mótmælisviðgerðum, umframt at tað heldur ikki ber til at kæra metingar hjá dómarunum undir dysti.

Eisini vísir kappingarnevndin á, at dysturin millum mansliðini hjá VÍF og Neistanum, sum Tjaldur vísti til í kæruni, ikki kann brúkast, tí í tí førinum var talan um brot á reglurnar, men at so er ikki í hesum førinum.

– Vit kæra málið víðari og senda longu í dag kappingarnevndini eitt svarskriv, har vit vísa á, at vit avgjørt halda, at tað, vit frammanundan hava kært, er brot á reglurnar, sigur næstformaðurin í Tjaldri, Niels Peter Bech.

– Vit meta, at dómararnir gjørdu brot á spælireglurnir í tveimum førum. Í fyrsta lagi, tá teir ikki syrgdu fyri, at VB tók fríkastið á tí staðnum, har dómurin fall, og í øðrum lagi, at teir ikki vístu VB-spælarunum út um tríggjar metrar, tá fríkastið skuldi takast.

Tjaldur vísir í sínum svarskrivi á, at av tí at kæran somuleiðis fevnir um brot á spælireglurnar, eigur hon ikki at verða viðgjørd afturvíst, men viðgjørd. – Vit hava fullan rætt at kæra hetta, sigur Niels Peter Bech.

## Steypafinalurnar

**Leygardagin**

| | | |
|---|---|---|
| kl.13.30 | Stjørnan-Tjaldur | kvinnur |
| kl.16.00 | Neistin-KÍF | menn |

**Sunnudagin**

| | | |
|---|---|---|
| kl.12.50 | H71-VÍF | gentur 10 |
| kl.13.35 | Neistin-Tjaldur | dreingir 10 |
| kl.14.20 | Neistin-Kyndil | gentur 12 |
| kl.15.15 | VÍF-Kyndil | dreingir 12 |
| kl.16.10 | Neistin-Kyndil | gentur 14 |
| kl.17.20 | H71-Kyndil | dreingir 14 |
| kl.18.30 | Neistin-Kyndil | gentur 17 |
| kl.19.45 | Neistin-Kyndil | dreingir 17 |

# Roynd og óroynd steypalið

**HONDBÓLTUR Stjørnan og Neistin hava ofta verið í steypafinalunum hjá ávikavist kvinnum og monnum, meðan hetta bara er aðru ferð, at kvinnurnar hjá Tjaldri og menninir hjá KÍF eru í finaluni**



ÓLÍKAR ROYNDIR

*Í steypafinalunum hjá kvinnum og monnum er talan um lið við ólíkum royndum, ið møtast. Stjørnan (myndin) og Neistin hava nógv oftari verið í steypafinaluni enn ávikavist Tjaldur og KÍF*

Mynd: Álvur Haraldsen

Hilmar Jan Hansen

Steypafinalan hjá kvinnunum hesa ferð verður millum Stjørnuna og Tjaldur, og hana eru Karstin og Kristian Joensen settir at døma. Hetta er ein endurtøka av finaluni fyri tveimum árum síðani, tá Stjørnan vann á Tjaldri við tveimum málum, 25-23.

Annars er talan um tvey ymisk mótstøðulið, um hugt verður at steypahagtølunum síðani 1987, tí meðan Tjaldur bara fyri aðru ferð er í finaluni, er hetta tann tólvta hjá Stjørnuni – og tann áttanda á rað. Stjørnan hevur somuleiðis vunnið steypafinaluna síðstu fýra árini, so klaksvíkskvinnur mugu helst liva við, at tær hava leiklutin sum favorittar leygardagin.

Gjøgnum árini er Neistin annars mest vinnandi steypaliðið hjá kvinnum, tí Neistin hevur vunnið steypafinaluna 11 ferðir. Stjørnan kemur so við sínum seks sigrum framman fyri VÍF við trimum, VB við tveimum og Skála og Kyndil, ið hava vunnið hvør sína ferð.

### Ólíkar royndir

Hjá monnunum er steypafinalan hesa ferð millum Neistan og KÍF, og her verður tað altjóða dómaraparið, Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen, ið skal døma. KÍF hevur bara eina ferð verið í finaluni afturi í 1986, tá tað gjørdist ein tepur 23-24 ósigur fyri Kyndli, meðan Neistin hevur munandi størri royndir.

Síðani fyrstu steypafinaluna hjá monnum í 1985, hevur Neistin verið við í teimum níggju, so hetta er tíggjunda finalan hjá teimum bláu, ið millum annað hava verið í tveimum teimum síðstu, ið báðar eru endaðar við sigri á grannunum úr Kyndli. So eisini í mansfinaluni er talan um tvey lið, ið hava rættiliga ólíkar royndir í steypakappingini.

Stóri gullslúkurin í steypafinalunum hjá monnum, hevur verið Kyndil, ið hevur vunnið níggju ferðir. So koma VÍF og StÍF við seks sigrum, og Neistin hevur vunnið fýra ferðir og H71 eina ferð.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Stóri steypadagurin

**HONDBÓLTUR Havnin eigur ikki færri enn 14 av 20 liðum í steypafinalunum hjá teimum yngru, sum verða spældar á Hálsi sunnudagin**

Hilmar Jan Hansen

Eru steypafinalurnar hjá teimum vaksnu leygardagin nakað, ið savnar fólk, so standa tær hjá teimum yngru sunnudagin einki aftanfyri. Í fjør vísti tað seg enntá, at tann fyrsta steypafinalan sunnudagin, sum var hjá gentum 10 ár, hevði fleiri áskoðarar enn kvinnufinalan dagin fyri!

Børnini eru sera spent til sunnudagin, tá tey ikki bara sleppa at spæla ein avgerandi dyst framman fyri nógvum áskoðarum, men eisini sleppa at spæla á altjóða hondbóltsgólvinum, sum verður liggjandi frá finalunum dagin fyri, so karmarnir eru teir bestu um barnafinalurnar eisini.

Finalurnar hjá teimum yngru eru 10 í tali, og tey feløgini, ið ganga oftast aftur, eru tey bæði stóru høvuðsstaðarfeløgini, Kyndil og Neistin, sum eiga seks lið hvørt, umframt at H71 hevur tvey lið í finalunum. VÍF og Tjaldur hava eisini tvey lið í part, og so hava Stjørnan og KÍF hvør sítt.

Dystirnir, ið gjørdu av, hvørji lið skuldu koma í steypafinalurnar, vóru leygardagin, tá liðini kundu spæla seg heilt fram í hálvfinalurnar. Vinnararnir har komu so í steypafinalurnar, sum verða nú sunnudagin, meðan tapandi liðini í hálvfinalunum spældu bronsudyst beinanvegin, so tey triðbestu liðini í hvørjum bólki longu tá fingu síni bronsuheiðursmerki.

Nú er so bara eftir at fáa upp á pláss, hvørji lið skulu hava gull- og silvurheiðursmerki, og óivað fer høllin á Hálsi at kóka hesar tímarnar seinnapartin sunnudagin, tá foreldur, systkin, ommur, abbar og onnur fara at seta sín dám á tær 10 finalurnar.